Sosialurin

# Gleðilig jól
# við Sosialinum og Betri pensjón

**20. november til 23. desember verður vanliga jóla-kappingin í Sosialinum har vit luta nógvir vinningar burtur, men í ár hava vit umframt tað eina myndakapping har høvuðsvinningurin er kr. 10.000,-**





**Barnamyndakapping** – Høvuðsvinningurin er ein kekkur á kr. 10.000 frá Betri pensjón

**Betri pensjón** letur allar vinningarnar til myndakappingina

**Betri pensjón** letur vinningar fyri íalt **kr 22.500** fyri bestu barnamyndirnar!

Mikudagin 23. desember verður kunngjørt, hvør hevur vunnið

1. virðisløn á kr. 10.000
2. virðisløn á kr. 5.000
3. virðisløn á kr. 2.500

**Fyri at vera við í kappingini eru treytirnar at:**

- bert eitt barn er á myndini
- barnið ikki er føtt áðrenn 1. januar 1998 og at tað er búsitandi í Føroyum
- myndin ikki er tikin av professionellum myndafólki
- myndin verður send sum jpg-fíla og er í góðari prentgóðsku og hon skal vera í litum. Vit góðtaka eisini viðgjørdar myndir.

**Send myndina til myndakapping@sosialurin.fo áðrenn ásettu tíðarfreistirnar og skriva:**

1. Navn á barninum, 2. Býur/bygd, 3. Aldur á barninum, 4. Navn á myndatakari, 5. Tel. nr.:

Tað er barnið, sum er á myndini, ið vinnur! Dómarir vera Jens Kristian Vang, fotografur hjá Sosialinum og Pætur Jensen, grafikari hjá Sosialinum og teir meta um motiv, litsamanseting, ljós og um myndin er væl troffin sum heild. Talan er sostatt ikki um eina vakurleikakapping.

**Hvørja viku verður eisini lutakast um 1.000 kr. millum innkomnu myndirnar úr hvørjum øki:**

| Kappingin er býtt upp í hesi øki: | innlatingarfreist |
|---|---|
| Norðoyggjar | týsdagin 17. november |
| Eysturoy | týsdagin 24. november |
| Streymoy (uttan Tórshavnar kommuna) | týsdagin 1. desember |
| Tórshavnar kommuna | týsdagin 8. desember |
| Mykines, Vágar, Hestur, Koltur, Nólsoy, Sandoy og Suðuroy | týsdagin 15. desember |

Innkomnu myndirnar vera at síggja í blaðnum so hvørt: fyrstu vikuna, meðan jólakappingin koyrir, prenta vit myndirnar úr Norðoyggjum, næstu vikuna úr Eysturoynni osv.

Vit kunnu ikki garantera, at rúm er fyri øllum myndunum. Sosialurin og Betri pensjón tilskilað sær annars rættin til at nýta innkomnu myndirnar.

**GG:** Vit góðtaka bert eina mynd av hvørjum barni.

Betri pensjón